gult cyan magenta svart

Var›veiti › náttúruperlu á Sandvíkum

Fleiri fólk vi› Hanusi Vang á odda hava inniliga heitt á Fri ›-ingarnevndina um at fri›a øki› inni í Sandvíkum, sum er á høgru hond undir Sandvíkahamrinum. B‡rá›i› hevur tó samtykt at ta› skal vera ítróttarøki

FRI‹ING
Stefan í Skorini

B‡rá›i› hevur samtykt at øki› inni í Sandvíkum skal vera n‡tt til ítróttarøki›. Hetta er á høgru hond, beint tá fari› er framvi› Sandvíkahjalla, tá tú fert nor›ureftir.

Ætlanin er, at byrsufelag skal skjóta til máls á økinum. Hesum eru nógv persónar har›liga ímóti og hava mótmælt til Fri›ingarnevndina.

Fri›ingarnevndin hev›i fríggjadagin seinnapart almennan fund, har fólk kundu bera fólk fram síni sjónarmi› fram.

Hanus Vang, fyrrverandi bóndi í Hoyvík, tók or›i› fyri tey, sum vilja var›veita øki›.

Hann sigur, at hetta øki› er ein náttúruperla, og tí er ta› harmiligt, um ta› ver›ur gjørt til ítróttarøki.

Hann vísir harumframt á, at ein rætt liggur inni í Sandvíkum, sum stavar frá landnámstí›, og henda hev›i komi› í vanda, um b‡rá›i› heldur fram vi› sínum ætlanum. Rættin er la›a›, og ta› eru ikki nógvar la›a›ar rættir eftir í landinum.

Hetta er eisini einasta pláss, har sey›urin í Hoyvíkshaganum kann sleppa oman í fjør›una at eta tara.

Hetta máli› fer heilt aftur til 1987, tá Hanus Vang var bóndi í Hoyvík. Tá nokta›i hann byrsufelagi at skjóta til máls á økinum, men hann gav undantaksloyvi til Oyggjaleikirnar í 1989.

Hanus sigur, at eftir Oyggjaleikirnar vildi byrsufelagi› ikki fara avsta› aftur, og tí var einki anna› at gera enn at beita løgregluna eftir teimum. Tey seinastu f‡ra árini hev›ur eingin skoti› á økinum, men útger›in hjá teimum stendur enn har.

Hanus Vang hevur veruliga stríst fyri, at hetta frálíka útfer›arøki› ikki skal fara fyri skeyti›. Hann hevur sent 60 skriv á tilsamans 300 sí›ur til ymiskar stovnar og myndugleikarnar um at fri›a øki›. Enn er ta› tó uttan ítøkiligt úrslit.

Um byrsufelagi› slapp at skjóta inni í Sandvíkum krevst, at eina betongflata ver›ur stoypt, so at alt kann sópast burtur.

Hanus metir, at hetta hev›i fullkomiliga oy›ilagt hesa frálíku náttúruperlu.

Nú skal Fri›ingarnevndin taka stø›u til máli›, og hon kemur til eina ni›urstø›u. Um nakar vil mótmæla úrskur›inum hjá Fri›ingarnevndini, so ber til at mótmæla til Yvirfri›ingarnevndina.

Naka› av fólki var møtt upp á almennum fundi hjá Fri›ingarnevndini vi›víkjandi fri›ing av økinum inni í Sandvíkum

Mynd: Jens Kr. Vang

ÁLMANAKKIN 2001

- ein bílig og viðkomandi jólagáva -

Í samfull 73 ár hevur Álmanakkin á so mangan hátt verið álitið hjá fólki á sjógvi og landi úti um heima. Haðani hevur tú altið fingið svar uppá spurningar um eitt nú dagar og mánaðar, sól og mána, skip, bátar og streym.

Álmanakkin 2001 inniheldur umframt alt tað vanliga, nýteknaði streymkort, kort yvir hagapartar, oljuloyvi, alivinnuna og føroyskar havnir.

Bókin er prýdd við litum og er 320 blaðsíður. Enn sum áður er Álmanakkin ein bílig bók. Óinnbundin kostar hann einans 125 krónur, meðan innbundna útgávan kostar 175 krónur.

Streymkort, kort yvir hagapartar, oljuloyvi, alivinnuna og føroyskar havnir.

Pf. H.N. Jacobsens Bókahandil
Tel +298 31 10 36 - P.O. box 55 - FO-110 Tórshavn
e-mail: hnj-book@post.olivant.fo

20. januar ver›ur koyrandi eftir Marknagilsvegnum

Leingi hevur veri › arbeitt vi› Marknagilsvegnum. 20. januar ver›ur eftir ætlan koyrandi eftir n‡ggja vegnum

MARKANGILS-VEGURIN
Stefan í Skorini

Bogi Haraldson, b‡arverkfrø›ingur í Havn, væntar, at koyrandi ver›ur eftir Marknagilsvegnum 20. januar.

Eftir tí›arætlanini skuldi veri› koyrandi eftir Marknagilsvegnum 1. desember, men for›ingar hava seinka› ætlanini naka›.

Bogi Haraldson leggur tó dent á, at vegurin er ikki li›ugur 20. januar, men ta› ver›ur bara koyrandi eftir honum. Naka› vantar tó í enn so sum innoyringar, gir›ingar og grótgar›ur.

Ta› er ikki greitt nær alt hetta ver›ur li›ugt, tí enn vita menn ikki, hvussu nógvur peningur ver›ur tøkur hjá teimum til hetta næsta ár. Mi›a› ver›ur tó eftir at fáa alt li›ugt í komandi ári.

Ta› var á heysti í 1998 at fari› var› undir arbei›i› vi› Dalavegin. Nú er so komi› til 3. byggistig.

Ta› hevur veri› rættiliga torført at leggja Marknagilsvegin, tí b‡rá›i› hevur ognartiki› ein part av grundøkinum hjá fólki, sum búgva framvi› vegnum. Men Bogi Haraldson sigur, at fólk hava veri› hjálpsom og hava samarbeitt væl.

Koyrandi ver›ur eftir Marknagilsvegnum 20. januar, men vegurin ver›ur tó ikki li›ugur tá

Mynd: Jens Kr. Vang

Gó›u tí›irnar halda fram

Búskaparrá›i› roknar vi› , at stóri vøksturin í búskapinum heldur fram eina tí› afturat. Higartil hevur vøksturin ikki havt trupulleikar vi› sær, og ney›ugt er tí ikki vi › inntrivum júst nú

BÚSKAPUR
Ey›un Klakstein

Gó› gongd er í føroyska búskapinum og roknast kann vi›, at stóri vøksturin heldur fram eina tí› afturat.

Hetta sigur Búskaparrá›i› millum anna› í n‡ggjari frágrei›ing, sum júst er komin.

Føroyski búskapurin er eftir øllum at døma ikki komin í eina javnvág eftir kreppuárini enn, hóast vit eru komin væl á veg í framlei›slunøgd.

– Enn er vøksturin ov stórur til at kunna kallast javnvágsvøkstur, sigur Búskaparrá›i›.

Orsøkin til ójavnvágina er serliga, at fæfeingi› framvegis er í holt vi› at laga seg til fylgjurnar av ójøvnu gongdina í búskapinum seinastu árini – fyrst vi› ógvusligu ni›urgongdini undir kreppuni, og sí›ani vi› stóru framgondini seinastu tr‡-f‡ra árini.

Meira goldi› í løn

Løngjaldingarnar fyrstu 11 mána›irnar í ár eru 10% hægri enn tær vóru í fjør, tá tær vuksu vi› gó›um 7 % sammett vi› 1998.

– Fer›in í búskapinum er sostatt ikki minka›, og líti› er, sum bendir á, at hon fer at minka› næsta ári›, sigur Búskaparrá›i›.

- Framgongd er í øllum pørtum av búskapinum, men ta› er serliga vinnulívi› á landi, sum hevur stóra vøkstur í løtuni. Enn liggja lønirnar væl ni›anfyri tær í grannalondunum, men stendur búskaparligi byr›urin vi›, kann væntast eitt ávíst tr‡st á lønirnar.

Ikki ney›ugt vi › tiltøkum

Búskaparrá›i› heldur ikki, at ta› enn er orsøk til at taka stig fyri at minka um fer›ina á búskapinum.

– Fer›in í búskapinum er í stóran mun grunda› á vanligar markna›armekanismur, og tí er eingin orsøk til at gera inntriv fyri at minka um fer›ina á búskapinum í løtuni, sigur Búskaparrá›i› í n‡ggjari frágrei›ing

Vøksturin í føroyska búskapinum byggir á vanligar markna›armekanismur, og tí er eingin orsøk til at gera inntriv fyri at minka um fer›ina á búskapinum í løtuni, sigur Búskaparrá›i› í n‡ggjari frágrei›ing

ismur – gó›an fiskiskap, gó›an fiskaprís og ein framhaldandi stóran tørv á íløgum eftir kreppuna, sigur Búskaparrá›i›, sum heldur at eingin orsøk er til at gera inntriv í løtuni.

– Hinvegin er ney›ugt, at fíggjarpolitikkurin heldur ikki ver›ur lakari, tí at økja um eftirspurningin, sum longu er ríkiligur, fer bara at økja tr‡sti› á framlei›slusektorin, ta› almenna og vi›skiftini vi› útheimin, sigur Búskaparrá›i›.

Búskaparrá›i›

Búskaparrá›i› er sett sambært løgtingslóg og skal koma vi› frágrei›ingum og tilmælum um búskaparligu vi›urskiftini í landinum.

Í Búskaparrá›num sita Hermann Oskarson, cand. polit, sum er forma›ur, John P. Danielsen, cand. polit., Una Joensen, cand. oecon, Marner Jacobsen, cand. Oecon, Anfinn Olsen, rei›ari, Anna Kass, M. Sc. í búskapi og Elisabeth Gaardbo, siviløkonomur.

Skrivari hjá rá›num er Jóannes Jacobsen, cand. Oecon.

Fingu ney›uga hvíld

Strandfaraskip Landsins siga, at reglurnar um hvílití› vór›u hildnar umbor› á Smyrli undir nógvu siglingini, tá Dúgvan fekk ska›a

Skipari og manning fingu ásettu hvilití›ina, tá Smyril gjørdi fleiri eykatúrar til Klaksvíkar í november mána›i, sigur Strandfer›slan

HVÍLDARTÍ ‹
Ey›un Klakstein

Strandfaraskip Landsins hava sent Sjóvinnufyrisitingini skriv í sambandi vi› ein klagu um vantandi hvíldartí› umbor› á Smyrli.

Smyril gjørdi í november mána›i og fyrst í hesum mána›inum eykatúrar til Klaksvíkar, tí Dúgvan var til umvælingar á skipasmi›juni í Havn.

Hetta hev›i vi› sær meira sigling hjá Smyrli, og Sjóvinnufyrisitingin hevur fingi› eina klagu um, at reglurnar um hvíldartí› hjá skipara og manning ikki vór›u hildnar undir hesi sigling.

Hesum vísir Strandfaraskip Landsins aftur.

Óhepnar skuldsetingar

Starvsfólkadeildin á Strandfer›sluni hevur samban vi› skipslei›sluni á Smyrli gjørt eitt yvirlit yvir arbei›sti› og hvílití› umbor› á Smyrli. Hetta yvirlit umfatar tí›arskei›i› frá 10. til 16. november, tá nógva siglingin fór fram.

Sambært hesum yvirliti fingu skipari og manning kravdu 70 hvílitímarnar um vikuna, og tí sta›festir Strandfer›slan, at áseting-arnar um hvílití› eru hildnar undir siglingini.

– Strandfer›slan metir, at ta› er óheppi› fyri trygdararbei›i› á stovninum, at slíkar skuldsetingar alment ver›a settar fram, uttan at ver›a grundgivnar, siga Strandfaraskip Landsins í skrivinum.